## DAGSINS MEINING

# Nýggjur Smyril

Leingi er tað, ið væl skal verða sigur eitt orðatakið og annað sigur, at tað er betri seint enn ongantíð. Hesi bæði munnu hóska væl til meginsamferðslulívæðrina Smyril, sum knýtur Suðuroynna saman við restina av Føroyum.

Leingi hevur verið tørvur á einum nýggjum og tíðarhóskandi skipi at byggja brúgv millum hesar partarnar av landinum. Hóast Smyril hevur tænt væl, so er hann væl og virðiliga niðurkoyrdur og tørvar ein avloysara.

Nú kemur hann so, tann nýggi Smyril, tó at vit skulu bíða í trý ár. Suðuroyingar mugu tí gera seg út við tolni, hóast tað ikki er nøkur løtt uppgáva, í eini tíð har ikki minst vinnulívið tørvar góðar og tryggar flutningsmøguleikar. Tað er tí greitt, at nýggi Smyril kemur í tøkum tíma.

At bygt verður nýtt, stórt og gott suðuroyarskip eigur eingin at seta spurnartekin við. Hetta er ikki bara rættur suðuroyinga, hetta er skyldan hjá samfelagnum Føroyum móti tí mest fjarskotna partinum av landinum.

Latið okkum síggja hetta sum eina íløga langt inn í framtíðina, eina íløgu í menniskju, trivnað og menning. Tosað verður um, at skipið fer at sigla so mikið skjótt og oftani, at suðuroyingar kunnu fara til Havnar til arbeiðis á morgni og heimaftur á kvøldi. Hvør veit, um tað í framtíðini ikki eisini kann ganga hinvegin – soleiðis sum tað var fyrr, at fólk norðanfjørðs fara til Suðuroyar at arbeiða.

Fyri ikki at tosa um tey, sum vilja ferðast í egnum landi. Tá er Suðuroyggin nakað heilt fyri seg. Eisini á hesum øki verða nýggir og spennandi møguleikar. Eitt vikuskifti ella fyri tað ein summarvika í Suðuroynni er ein ógloymilig uppliving, ikki minst fyri teir mongu føroyingar, sum ongantíð hava dittað sær at fara »suðureftir«. Eitt skjóttgangandi og komfortabult skip kann fáa alstóran týdning fyri oynna sum ferðamál. Men fyrst og fremst hevur tað týdning fyri fólkið í oynni at fáa hetta nýggja skipið.

Vónandi verða ongar forðingar nú. Vinnumálaráðharrin hevur saman við Strandferðsluni gjørt eitt gott arbeiði, sum nú vónandi verður sett í verk alt fyri eitt. Ætlanin hjá Vinnumálastýrinum at lata føroysk listafólk prýða strandferðsluskipini er eisini eitt frálíkt hugskot. Og vónandi fara listafólk at taka væl ímóti tí.

Vit ynskja suðuroyingum og øllum føroyingum góða eydnu við hesi stóru verkætlan. Tað er ein dýr íløga, men hon er neyðug.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Íløgukvotan er órættvís

**Súni í Hjøllum**



Í hesum døgum sita embætisfólkini hjá landsstýrinum og arbeiða við uppskoti til fíggjarløgtingslóg fyri 2002. Somuleiðis skulu kommunurnar undir sítt arbeiði til fíggjarætlan fyri 2002.

Seinastu tvey árini hava kommunurnar fingið eina sonevnda íløgukvotu frá landsstýrinum at halda seg til.

**Skipanin er órættvís**

Undirritaði tekur fult undir við, at landsstýrið í ávísan mun ásetur íløgukvotu til kommunurnar til tess at tálma ov stórari búskaparligar ferð í samfelagnum, men skipanin er sera órættvís.

Undanfarnu árini hava allar kommunur um ein kamb fingið eina ávísa íløgukvotu í mun til fólkatalið. Spurt verður als ikki um:

- Skuldarbyrðu
- Slag av íløgu

Henda skipan kann ikki halda fram, tí fleiri kommunur eru so tyngdar av skuld, at tær áttu at fingið boð um at fáa rættlag í síni fíggjarviðurskifti, áðrenn talan verður um fleiri íløgur.

Harafturímóti eru tað fleiri kommunur við ongari, ella nærum ongari skuld, sum ikki fáa loyvi til at gera størri íløgur, enn kvotan frá landsstýrinum loyvir, hóast nógvur peningur er tøkur.

Landsstýrið eigur eisini at hugsa um at býta íløgurnar upp í ávís sløg. Ávísar íløgur í at geva vinnulívinum í kommununi betri umstøður, kunnu geva ferfalda inntøku beinanvegin til alt samfelagið, meðan íløgur í skúlar, barnaansing, eldrasambýli, vegir, útstykkingar o. a. eiga at ganga inn í eina langtíðarfíggjarætlan hjá kommununi.

**Samandráttur**

Í dag verða tær kommunur, sum hava roynt at halda skil á sínum fíggjarviðurskitum revsaðar, meðan kommunur, sum í 1980-unum brúktu nógv, gjørdu stórar íløgur og læntu nógvan pening, bjóðaðar at gera eins stórar íløgur.

Hetta er ikki skynsamur fíggjarpolitikkur og kann als ikki góðtakast.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og løgmaður eiga at taka stig til at broyta mannagongd í hesum máli beinanvegin. Broytingin eigur at koma til fíggjarætlanina fyri 2002.

# Uppskot til endaliga loysn av fullveldismálinum

Eftir at hava lisið greinarnar »Hesuferð skal tað vera endlösung« hjá Rolf Guttesen, greinina »Verða tílík fólk ikki skotin í øðrum londum« eftir Dagfinn Danbjørg, o.a. líknandi greinar seinastu tíðina, skjóti eg upp, at javnaðarflokkurin og sambandsflokkurin í felag leggja fram lógaruppskot um at øll fullveldisfólk skulu bera eitt frámerki á sýniligum stað (t.d. eina gula stjørnu). Hetta hevði tænt Ríkinum væl at fingið markað hesar samansvornu landasvíkjarar, og hevði eisini lætt um tá teir skulu avrættast.

Eitt fólk - eitt Ríki!

**Jón Tyril**

# Pensjónsmálið

**Edmund Joensen**

Uppskot Sambandsfloksins um hækkan av pensjónunum, hevur eftir øllum at døma fingið landsstýrismannin, Sámal Petur í Grund at vakna.

Tað letur til, at landsstýrismaðurin við pensjónsmálum, eftir Ólavsøku er vaknaður sum við kaldan dreym.

Fyrsta útpurringin var fýra dagar fyri ólavsøku, tá ið Sambandsflokkurin lat Føroya Løgtingi uppskot sítt, um at seta 800 mió. krónur í grunn, til hækkan av pensjónum. Talan var um skattafrítt útgjald, ið skuldi fáast at virka frá nýggjárinum komandi.

Onnur útpurringin, landsstýrismaðurin fekk, var tá ið løgmaður hevði hoyrt um uppskot Sambandsfloksins í útvarpinum, og fór at hyggja í løgmansrøðuna, sum hann skuldi halda. Hvat stóð í skjølunum frá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum um pensjónir? Har var ikki nógv at heinta. Hann fann ikki so mikið sum eitt einasta orð um hetta mál.

Nú vóru góð ráð dýr! Óli Breckmann hevði eisini hoyrt útvarpið, og ringdi til løgmann at purra hann út. Hetta brotið um fólkatrygging stendur jú í samgonguskjalinum á fjóra ári, men enn er spónurin ikki settur í »greytin«, og eingin veit heldur, hvat skal standa í uppskotinum (ikki sannheit)?

Tað at Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður ikki nevnir pensjónir við einum orði í sínum uppleggi til løgmansrøðuna, og heldur ikki hevur nakra ætlan, meðan Sambandsflokkurin hevur eitt ítøkiligt uppskot, tað fer ikki at bera til, og sær heldur ikki gott út fyri samgonguna.

Tí eru einastu ráðini (tíðin er stutt), at løgmaður skoytir uppí sín egna tekst til løgmannsrøðuna, nakrar reglur úr gomlum løgmansrøðum, um at »neyðugt er í størri mun at tryggja aldurdómin...« o.s.fr.

Løgmaður tekur harumframt dýnuna av Sámal Peturi, og gevur landsstýrismanninum turt uppá, og gevur beinleiðis ordrar til at taka málið fram aftur úr gloymskuni. Hann skal látast sum, um at málið er ávegis. (Samgongan arbeiðir við málinum, - ikki sannheit?)

Hetta er eisini neyðugt at hava í bakhondini seinni, tá ið uppskot Sambandsfloksins av samgonguni skal fellast.

**Løgmansrøður**

Vanligt er, tá ið løgmansrøður skulu skrivast, at allir landsstýrismenn verða bidnir um at koma við sínum íkasti til røðuna. Tað sigur seg sjálvt, at tá ið einki orð er at finna um pensjónir, frá landsstýrismanninum, Sámal Petur í Grund, sum umsitur málið, so má takast til onnur ráð. Løgmaður skoytir tí sjálvur nakrar reglur uppí um pensjónir.

Eg eri sannførdur um, at tað hevði einki uppskot komið frá landsstýrinum á pensjónsøkinum, um ikki uppskot Sambandsfloksins varð sett fram. - Líka lítið sum seinasti skattalætti hevði verið givin, um ikki Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin høvdu sett sítt egna uppskot fram um skattalætta. Hetta gjørdi, at landsstýrið tá føldi seg noytt at koma við einum minni skattalætta.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Det alminnelige

**Willy R. Kastborg**



### Om en fugl, en biskop og et livsverd

I dag er himlen blekblå rosaskimrende. Bare et sted bak det blå fjellet er den gnistrende rød.

I dag er vårt hus rosa. Vinduene er gule flammer i gjenskinnet av en oppgående sol.

Det sitter en fugl i vårt kjøkkenvindu. En liten fugl. Ikke imponerende som sulen. Ikke storslått som ørnen i den svimlende himmelflukt, eller farverik som stæren når solgyldne stråler spiller ut dens røde, blå og svartgnistrende register. Den lille fugl i vårt kjøkkenvindu er den minst påaktede av alle luftens vingende skarer. Den alminnelige vi kaster et uinteressert blikk på, og overser.

En spurv i sin uanselige grå og brune fjærdrakt.

Vi hilser gjenkjennende på hverandre. Jeg sier.

– Så du fløy i land her. Jeg er glad du gjorde det.

Min fuglevenn heter Elise. Jeg vet det. Jeg har selv navngitt henne under hennes to døgns ferd som blindpassasjer fra Norge til Færøyene. Mellom to av de store containere på fordekket av det gode islandske skip »Bruarfoss« innrættet hun seg lunt i le for regn og kraftige vinder. Hennes føde? Jeg tilstår. Jeg delte mine måltider med henne.

Da jeg for et ukjent antall år siden la ned stenheller i min have i kystbyen i det østlandske Norge, møttes vi første gang. Hun landet brått og uventet ved min side. De harde, bankende lyder av hammer mot stenheller skremte henne ikke. Ustanselig kvitrende fulgte hun tett inntil meg mens jeg arbeidet meg fremover. Hennes lokkende snatren ble høyere. Ivrigere. Jeg forsto hva hun sa.

– Legg bort hammeren. Ta en pause, og la oss bli kjent med hverandre. La oss ha glede av hverandres selskap.

Tre møter. I to land, og i et skip. En hverdagsfugl har vist meg ennå et av livets mange paradokser. Alt er alminnelig, og intet er alminnelig. Jeg har sett det ualminnelige i det alminnelige.

I studen står radioen på. Jeg lytter til et minneprogram om et menneske jeg kjente. En stor og nyskapende kunstner. Omstridt i sin skapergjerning. I sitt liv vekslende i ekstreme utsving mellom dyder og laster. Jeg hører stemmen i radioen dosere at ingen er uunnværlig. Vi kan alle erstattes. Det er en løgn. Farlig og livsreduserende. Sannheten er den motsatte. Intet menneske kan erstattes. Ikke denne rikt begavede mann. Ikke den minst utrustede blant oss. Jeg tror ikke på tilfeldiheter. Jeg tror ikki på det hensiktsløse. Jeg tror at enhver er satt inn i livet med en oppgave som alene hun eller han kan utføre. Vi har alle vårt livsverd og vår livsoppgave. Om det så bare er det å være til. Ethvert menneske skaper øyeblikk av glede hos andre.

I vår post er et brev fra en som står oss nær. Det inneholder to korte setninger. »Jeg er glad for at dere er til. Jeg er glad for at dere er dere«.

I kjøkkenet ser jeg Elise som forsyner seg med smuler av mitt brød. I speilet ser jeg meg.

En alminnelig fugl. Et alminnelig menneske.

Det er hva vi er de fleste av oss. Alminnelige. Men også ualminnelige og uerstattelige.

Tankene vandrer til mine unge år. Til min første tid som journalist. Jeg skulle intervjue den norske katolske kirkes overhode. Jeg visste intet om ham. Jeg hadde den tids fastslåtte bilde av en kirkens mann. Han fester ikke. Han danser ikke. Han ser ikke film, og går ikke i teater. Han røker ikke og drikker ikke. Biskop Mangers tok i mot meg i sitt studieværelse. Jeg så en liten mann, som virket selvutslettende og sky. Ubetydelig. Jeg oppdaget noe annet. Et menneske gjennomlyst av åndskraft. Han var en stor mann i en liten kropp.

Han stilte det første spørsmål. Ønsket jeg et glass sherry? Eller foretrakk jeg portvin? Den lille biskop så min forbløffelse, og leste mine tanker. Han smilte.

– Min venn. Hvem er jeg at jeg skulle forsmå Guds gode gaver?

I Bøkenes bok skriver Predikeren at intet er nytt under solen. Sant? Ja, og nei. Intet er nytt. Alt er nytt.

Hver dag er en ny dag.
Hvert landskap er et nytt landskap.
Hver reise er en ny reise.
Hver mulighet er en ny mulighet.
Hvert menneske er et nytt under.
En gave.
Unik, enestående og berikende.




# Heilsuráði mannað

**Tíðindaskriv**

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur sett Trivnaðar-og heilsuráðið.

Tey sum eru sett eru:

**Jona Nielsen,** fyristøðukvinna á Klaksvíkar Sjúkrahús — fyri heilsuøkið.

**Jákup H. Foldbo**, stjóri fyri Heimarøktina og Petra Joensen, stjóri fyri Almannastovuna — fyri almannaøkið.

**Jens Marius Poulsen**, kommunustjóri — fyri kommunurnar.

**Jens Muller**, lærari, Vágur — fyri brúkararnar.

**Mia Pedersen,** Vestmanna — við serligum innliti í almanna- og heilsuviðurskift.

Landsstýrismaðurin hevur avgjørt at seta Miu Pedersen sum formann í ráðnum og verður Jákup H. Foldbo næstformaður.

Sambært løgtingslógini, skal ráðið gera eina útgreining av føroyska almanna-og heilsuverkinum og gera uppskot til eina langtíðarætlan fyri føroysku vælferðartænastuna.

Limirnir í Trivnaðar-og heilsuráðnum útgreina arbeiðssetningin saman við landsstýrismanninum.

Trivnaðar-og heilsuráðið skal lata landsstýrismanninum álit við tilráðing í seinasta lagi 31. desember 2001.

Í hesum sambandi skal verða sagt frá, at Almanna- og heilsumálastýrið tilevnar eitt lógaruppskot at leggja fyri Føroya Løgting, um at fáa hesa freist longda til 31. desember 2002.

Skrivari til Trivnaðar-og heilsuráðið verður settur ein av fyrstu døgunum.